# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 08.09.2021 |
| Mál nr.: | 21/16761 |
| Málsviðgjørt: | JEK |
| Ummælisfreist: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin), løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) og løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum**
(Skattligar avleiðingar av negativari rentu)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 4. mai 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1, nr. 7 verður strikað.

**2.** Í § 10, stk. 1 verður 1. pkt. orðað soleiðis:

“Fyri likamligar persónar og deyðsbúgv verða rentuinntøkur, undantikið negativar rentur av lánum, sum eru fevnd av løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, roknaðar upp í uppgerðina eftir § 14.”

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 10. desember 2020, verður gjørd henda broyting:

Í § 33, nr. 1 verður 1. pkt. orðað soleiðis:

“Rentuútreiðslur av íløgu- og rakstrarskuld í sambandi við vinnuvirki og negativ renta av innistandandi hjá vinnuvirki, útreiðslur til provisión, stovningarprovisión ella premiu í sambandi við lántøku ella ábyrgd til vinnuvirki.”

**§ 3**

Í løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 4. mai 2021, verður gjørd henda broyting:

§ 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 3.* Rentuútreiðslur, fevndar av § 2, verða lækkaðar við negativari rentu á lánum, fevnd av § 2."

**§ 4**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Við uppskotið verða galdandi reglur um negativa rentu nágreinaðar.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Ivi er sáddur um, hvørt ásetingarnar í kapitalvinningsskattalógini um negativa rentu kunnu nýtast til mótrokning í positivari saldo í uppgerðini eftir § 14. Eisini er ivi sáddur um, hvørt reglurnar í skattalógini loyva vinnurekandi frádrátt fyri negativa rentu á innlánum. Loksins er ivi sáddur um, hvørt hugtakið "útlánskonta" er rætta heitið at nýta í kapitalvinningsskattalógini og rentustuðulslógini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at neyvlýsa galdandi reglur um negativa rentu í kapitalvinningsskattalógi, skattalógini og rentustuðulslógini.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða galdandi reglur um negativa rentu í kapitalvinningsskattalógini, skattalógini og rentustuðulslógini lýstar neyvari.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin), løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) og løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum er sent til hoyringar hjá Felagnum Peningastovnar, Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Vinnuhúsinum og TAKS.

Harumframt hevur uppskotið ligið alment frammi á hoyringsportalinum hjá Føroya landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Við uppskotinum verða galdandi reglur um negativa rentu í kapitalvinningsskattalógini, skattalógini og rentustuðulslógini lýstar neyvari.

Uppskotið hevur tí jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Við uppskotinum verða galdandi reglur um negativa rentu í kapitalvinningsskattalógini, skattalógini og rentustuðulslógini lýstar neyvari.

Uppskotið hevur tí jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Lógaruppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Lógaruppskotið er ikki í ósamsvari við ásetingarnar í Evropeiska mannarættindasáttmálanum, EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Løgtingslógin er ikki í ósamsvari við ásetingarnar í Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Tað eru ikki kendar markforðingar á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir. Uppskotið ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið nágreinar m.a. ásetingarnar í kapitalvinningsskattalógini og skattalógini um negativa rentu.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein undir landsstýrinum ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð?

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

# Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

## 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Niðanfyri í serligu viðmerkingunum til einstøku ásetingarnar verður stutt greitt frá høvuðsinnihaldinum í ásetingunum.

### Til § 1

Nr. 1
Við uppskotinum verður § 1, nr. 7 í kapitalvinningsskattalógina strikað.

Við broytingini í § 10, stk. 1, 1. pkt. í kapitalvinningsskattalógini verður nágreinað, at tað ikki eru negativar rentur sum heild, sum eru fevndar av kapitalvinningsskattalógini, men bert negativar rentur av øðrum lánum enn teimum, sum eru fevnd av løgtingslóg ikki stuðul til rentuútreiðslur av lánum.

Inntøkur frá ikki-vinnurekandi virksemi orsakað av, at rentan er negativ eru sostatt framvegis fevndar av § 1, nr. 6 í kapitalvinningsskattalógini.

Vinningur frá vinnurekandi virksemi orsakað av, at renta er negativ verður hinvegin framvegis roknaður upp í skattskyldugu inntøkuna sambært skattalógini.

Nr. 2
Við broytingini í § 1, nr. 1 og 2 verður gjørt greitt, at hugtakið “rentuinntøkur” eisini fevnir um inntøkur, sum standast av, at renta av einum láni er negativ.

Somuleiðis verður gjørt greitt, at rentuinntøkur, sum standast av, at rentan av lánum, fevnd av rentustuðulslógini,, er negativ, ikki skulu viðgerast eftir kapitalvinningsskattalógini, men í staðin eftir rentustuðulslógini.

**Til § 2**

Við broytingini verður neyvlýst, at tað ikki bert eru rentuútreiðslur av íløgu- og rakstrarskuld í sambandi við vinnuvirki, útreiðslur til provisión, stovningarprovisión ella premiu í sambandi við lántøku ella ábyrgd til vinnuvirki, sum koma undir ásetingina, men eisini negativ renta av innistandandi hjá vinnuvirki.

**Til § 3**

Ivi er sáddur um, hvørt hugtakið *útlánskonta* er rætta hugtakið at nýta.

Ásetingin er tí umorðað. Eftir umorðingina er farið burtur frá hugtakinum *útlánskonta*.

**Til § 4**

Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 8. september 2021

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: